

# Krásiligt og stásiligt á Hálsi

**Nýggja handilshúsið Miðlon letur upp hósmorgunin kl 9**

HANDILSLÍV
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Her er ein ófatiligur aktivitetur, nú 46 tímar eru til dyrnar lata upp á nýggja krásiliga handilshúsinum: Miðlon á Hálsi.

Eini 40 fólk - handverkarar, vaskifólk, vindeygapussarar og handilsfólk dríva á at fáa Miðlon lidna til hósmorgunin klokkan 9, tá røðin av keypihugaðum føroyingum verður latin inn.

Tá eg og myndamaðurin trína inn í ljósu og stóru forhøllina, fúka neistar frá vinkulslíparum um oyrini á okkum, handverkarar ganga um beinini á hvørjum øðrum, og handlarnir, sum skulu lata upp, eru vardir av stórum plastpresendingum, so lagið av sementstøvi ikki fýkur inn á nýggju køkarnar, flatskermarnir og gávulutirnar. Allastaðni standa hálvfullir kassar við vørum, og fólk renna til og frá, og kortini finna vit leiðina niðan á hornaskrivstovuna hjá stjóranum í Miðlon, Mads Andreas Winther.

– Húsið er fyrst og fremst bygt til okkara egnu handlar, so sum Elding og Inspiratión, sigur hann, og býður okkum sess í nýggju stólunum, sum enn hava prísseðil á. Og so ein kopp av kaffi í platsbikari.

Og Mads Andreas greiðir frá, at í fyrsta umfari lata fimm handlar og ein café upp, og seinni koma hárfríðkanarstovan Fríðkan, ein deild av Norðoya Sparikassa, umframt ein handil við barnaklæðum.

– Enn eru einir 400 fermetrar tøkir, og nógvir fyrispurningar hava verið um at sleppa at leiga, sigur Mads Andreas Winther, sum tó ikki hevur tikið av nøkrum enn.

## Fyrst fimm handlar

Handlarnir, sum lata upp hósmorgunin, verða í fyrsta umfari Elding, sum er partur av danska El-giganten.

– Víddin á handlinum verður fýra ferðir størri enn vit høvdu í SMS, og vøruúrvalið økist samsvarandi. Eitt nú verður størri dentur lagdur á teldur, og annars at vísa allar vørurnar betur, sigur Mads Andreas, sum eisini hevur sett fleiri fólk í starv.

Næsti handilin verður "HTH - setið saman", sum tekur støðið í lágpríshugtakinum, sum vit kenna úr eitt nú Ikea, har til ber at peika ein køk út, og so fáa hann heim í kassum. So kunnu fólk sjálvi seta køkin saman og harvið spara eina rúgvu av peningi.

Hin av køkshandlunum verður HTH køkstorgið, sum koyrir upp á vanliga køkshandilshugtakið, har fólk fáa ein skræddaraseymaðan køk eftir egnum ynski.

– Hesin HTH handilin veður flottasti HTH handilin í kongaríkinum, tá hann verður liðugur, sigur Mads Andreas Winther, sjóri,



LEYST STARV
Vit søkja eftir fólki at bera bløð út í Vági.
Ert tú 13 ár, og hevur hetta tín áhuga, so ring á tel. 35 14 05 frá kl. 10 - 17
ella send ein teldupost: utbering@prent.fo

PRENTMIÐSTØÐIN
Smyrilsvegur 13 • Postboks 3314 • FO-110 Tórshavn

Fyribilsstørv

Manning

Við hesum verður søkt eftir stýrimonnum, maskinmeistarum, dekkarum og kioskfólki til strandfaraskipini í tíðarskeiðinum frá 1. apríl til 29. apríl 2006.

Freistin at søkja størvini er 15. mars 2006.

Sí lýsing á heimasíðu okkara www.ssl.fo

REPROZ

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo